

# Føroyingar streyma til Lalandia

Tiltikna danska feriustaðið hevði í fjør tvífalt so nógvar føroyingar á vitjan sum undanfarna ár. Marknaðarleiðarin fegnast um føroysku vitjanini og heldur, at føroyingar av álvara hava fingið eyguni upp fyri Lalandia

Heldur tú feriu á Lalandia í Danmark er møguleikin góður fyri, at tú rennur teg inn í onkran annan føroying, sum ger tað sama.

Nýggjastu tølini hjá Lalandia vísa, at talið á føroyskum gestum var sera høgt í 2006. Tvífalt so nógvir føroyingar hildu feriu á Lalandia í fjør sum undanfarna ár, og tað fegnast tey um á Lalandia.

- Føroyingar hava álvara fingið eyguni upp fyri Lalandia, og vit eru sera fegnir um at hava so nógvar gestir úr Føroyum, sigur Henrik Høgstrup, sum er marknaðarleiðari fyri Lalandia.

**Byggja út**

Lalandia er størsta feriustað av sínum slagi í Norðurlondum, og tað koma nógv fólk úr útlandinum til Lalandia at halda feriu. Nógvir týskarar og norðurlendingar leggja leiðina fram við Lalandia, har ein ørgrynna av aktivitetum eru – bæði undir taki og opnum himni.

Tað er ikki minst stóra baðilandið, sum lokkar nógv fólk, og hetta baðiland skal í næstum útbyggjast, so tað verður enn størri og meira spennandi.

Haraftur skal eitt nýtt – og enn størri Lalandia – byggjast í jútlandi nær við Billund.




*Kent Christensen, markanaðarstjóri hjá Atlantsflog, Bassi, og Finnur Hansson, sølumaður hjá Poul Michelsen, heilsølu. Á samkomu í Miðlah*

# Bassi og Sosialu

Tað var Bassi, sum trekti hepna vinnaran av høvuðsvinninginum í jólakalendarakappingini hjá Sosialinum - teimum 18 ferðunum við Atlantsflog til Lalandia í eina viku.

Vinnarin var Marianna Nolsøe í Fjalsgøtu í Havn. Hon fær høvi at bjóða 17 fólkum saman við sær til at vitja frítíðarstaðið Lalandia í eina heila viku - umframt flogferðirnar við Atlantsflog aftur og fram.

Tað var á samkomu í Miðlahúsinum hósdagin, at vinningarnir vórðu trektir.

Hesa vikuna hevur Atlantsflog sett 2100 ferðaseðlar til trý ymisk ferðamál, Reykjavík, Billund og Keypmannahavn til sølu fyri serligan prís. Kent Christensen, marknaðarstjóri hjá Atlantsflog sigur, at undirtøkan fyri hesum hevur verið góð. Sølan byrjaði mikudagin og endar týsdagin komandi.

Annars sendir Atlantsflog ferðaskránna ÚT Í HEIM í hvørt hús í landinum nakrar